VIÐMERKINGAR

# Gekkaskortarnir mugu falla

**Høgni Hoydal**



Tað støðuga persónsstríðið í fullveldismálinum má halda støðga. Hetta setir serliga kílar millum javnaðarfólk og tjóðveldisfólk. Vit eiga tí at lata gekkaskortarnar falla innan fólkatkvøðuna.

Spurningurin er einfaldur: Er tað fólkið í Føroyum, sum hevur avgerðarrættin ella eru tað danskir myndugleikar?

Nærum í hvørjum orðaskifti um fullveldismálið kenni eg tað so, at alt skilagott samskifti endar við, at persónsspurningar, forfeingiligheit og uttanumtos forða fyri semjum. Nú sigur formaður javnaðarfloksins so enntá, at Tjóðveldisflokkurin forðar fyri eini loysn. Mangt skal ein hoyra, áðrenn av dettur oyra.

## Aftur og fram

Ta einu løtuna verður Tjóðveldisflokkurin skýrdur at standa fyri kubbing og kvetting og at offra vælferðina hjá føroyingum. Ta næstu løtuna verður hann skýrdur at vilja hava danskar pengar í allar ævir og at vera ov lítið loysingarsinnaður. Ta triðju løtuna sigur javnaðarflokkurin seg stuðla, at blokkstuðulin skal burtur undir øllum umstøðum. Ta fjórðu løtuna sigur javnaðarflokkurin, at hann vil fara longur enn Tjóðveldisflokkurin. Ta fimtu løtuna sigur Javnaðarflokkurin, at Tjóðveldisflokkurin aftur vil kubba og kvetta og offra blokkstuðulin.

Hetta hongur ikki saman. Hetta kann ikki halda fram. Hetta tykist sum ein ævigur sjónleikur, har tað snýr seg um at spæla ein leiklut, sum ongin skilur meiningina við longur. Tað tykist sum stívnaðir gekkaskortar verða hildnir fyri andlitið – hóast aðrir tankar og kanska heit hjørtu fjala seg aftanfyri.

Lat okkum so gloyma persónarnar og viðgera sakina.

## Víðkað sjálvstýri

Trupulleikin er, at danska stjórnin viðurkennir ikki, at tað er Føroya fólk, sum hevur avgerðarrættin í Føroyum. Tað hava vit jú fingið sligið fast við sjeytummaseymi í samráðingunum.

At Poul Nyrup Rasmussen so sigur í svari til ein fyrispurning frá formanni Javnaðarfloksins, at føroyingar kunnu fáa víðkað sjálvstýri inni í danska ríkinum, er onki nýtt og broytir jú onki uppá viðurkenningina.

»Der er således ingen ændring i Færøernes statsretlige og folkeretlige status«, slær hann jú fast í seinasta brævinum til løgmans.

Ongin kann sostatt halda fram at siga: At vit kunnu hava evsta vald í landinum uttan at hava fullveldi. At siga, at vit skulu hava evsta vald og evstu ábyrgd – men bara á summum økjum, sum danska stjórnin loyvir okkum. Tað er rætt og slætt ein stór sjálvmótsøgn í sjálvum sær.

## Semjan liggur beint fyri

Um vit nú heldur orða spurningarnar, so vit koma til kjarnuna í málinum, so kann og eigur ikki at vera nøkur størri ósemja millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin um tjóðskaparspurningin.

1. Eru vit samd um at føroyingar eru tjóð við fullum sjálvsavgerðarætti?
2. Eru vit samd um, at tað er føroyska tjóðin – Føroya fólk – sum skal hava evsta valdið, ognarrættin og yvirvaldsrættin til Føroya land?
3. Eru vit samd um, at tað bert eru teir myndugleikar, sum Føroya fólk velur á demokratiskan hátt, sum kunnu umboða føroysk áhugamál?
4. Eru vit samd um, at vit skulu gerast fíggjarliga og búskaparliga sjálvbjargin og minka blokkstuðulin burtur í eini rímiligari skiftisskipan?
5. Eru vit samd um, at vit skulu hava eina grundlóg, sum Føroya fólk sjálvt skal góðkenna, sum ásetur rættindir og skyldur hjá føroyingum, og sum ásetur, hvørjir myndugleikar kunnu útinna vald í Føroyum?

Eru vit samd um hesar spurningarnar, so er tað okkara skylda, at leggja persónsstríð niður og heldur stríðast fyri at gjøgnumføra okkara felags mál.

Tað er okkara skylda at lata gekkaskortarnar falla innan fólkaatkvøðuna.

# Útgerðarhavn

**Alvin Joensen**

Tað er sindarligt at síggja hvussu, Føroyingar aka á berum skalla: Eitt tað fyrsta, man burdi hugsa um, nú loysingin stendur fyri durum, burdi verið at spart har sparast kann, og brúkt teir møguleikar, sum eru til staðar, í samfelagnum í dag, og ikki gera dýrar óneyðugar loysnir, bert fyri at tað heila skal verða so stórt og hábærsligt.

Fyri nøkrum árum síðani bleiv bygt í Akrabyrgi, stórt, flott og dýrt. Men nyttan við hesum byggjaríi, man verða minimal, sum støðan er í dag. Hevði hendan støðin ikki verið, sera væl egna til MRCC støð? Nei eg bert hugsi. Tað er møguligt at tað verður for bíligt at brúka. Støðin er jú har og tað skal nok ikki gerast so nógv við hana, áðrenn hon kann brúkast til MRCC støð. Og so liggur hon eisini i Suðuroy? Ikki tí, tað man ikki verða so nógv arbeiðspláss sum koma burtur úr eini slíkari støð. Men alt fløvar. Kanska vit kundu spart nakrar, av okkara sjalvstýriskrónum her. Tí onki er at ivast í, at tað landsstýri ætlar í dag, eru burturspiltir pengar. 20 mió. til keyp, (10 mió. til umbygging). Ein loysnin kundi verið, at 10 mió. vórðu brúktar til (umbygging), av støðini i Akrabyrgi, og hinar 20 mió. fóru til at gera eina útgerðarhavn Í Vági. Soleiðis hevði man kunna skapt nøkur brúkilig, verandi virðir í samfelagnum. Tí sum er, høvdu norðingarnir onki mist uppá hetta, vit í Suðuroy eru ikki førir fyri at geva tað tænastu sum skal til, so her hevði verið ein møguleiki hjá virkjunum norðanfjørðs, ikki bert í sambandi við oljuna men, eisini virksemi í Suðuroy. Møguligt. Tað hevði verið løgi um virkini Norðanfjørðs, longu standa klár til hesa avbjóðing?

Tá ið man hevur verið á rannsóknarferð í Suðuroy, á Drelnes kl.12, norður aftur kl.14, man tað hava verið við vilja, ella bert fyri at undirstrika, støðuna í samferðsluni til Suðuroy, og facilitetirnir her, tað er heldur ikki so nógv at hyggja eftir. Men mátin sum tað heila verður bygt uppá, er undir alt lágmark.

Meðan »fullveldisfólk« berjast um stakkalastás:

# Skræða gribbarnir solidarisku skipan okkara sundur



**Hans Jørgensen**

Tjóðveldisflokkurin dubbar til harðan bardaga. Nú skal Javnaðarflokkurin hava toyggið, Sosialurin er fyrsta offrið. Nú eru tey kroyst, men møguliga skuldi tað til fyri at vekja tey úr dreyminum, tey krevja, at øll onnur skulu droyma.

Í Sosialinum 19. januar hevur Anita á Fríðriksmørk, løgtingskona, kvassorðaða og eftir mínum tykki lítið konstruktiva grein. Eg ætli mær ikki at viðgera hennara neyðarróp, nú hon sýnist at vera kroyst upp í ein krók politiskt. Rottan ger tað sama, hon loypur á og bítur, tá hon ongan annan útveg finnur.

Eingin uttan Anita á Fríðriksmørk og nakrir aðrir »fulltiknir« tjóðveldismenn kunnu sannførast um, at Tjóðveldisflokkurin og fullveldisætlanin eru burturtagd og forfylgd í Sosialinum. Tvørturímóti halda fleiri, at júst Tjóðveldisflokkurin hevur fingið lutfalsliga alt ov stóra rúmd í fjølmiðlunum – eisini Sosialinum – og tað hevur havt við sær, at onnur týðandi samfelagsviðurskifti eru púra tagd burtur. Hetta hevur so aftur havt við sær, at ert tú ikki samdur við fullveldisætlanini hjá samgonguni og Tjóðveldisflokkinum, so ert tú eitt grenj og ókonstruktivur. Thurid Debes Hentze segði einaferð, at tað er sera trupult at vera kritiskur um nakað, sum er positivt betónað. Fullveldisætlanin er positivt betónað, og tí er tað sera trupult at viðgera ta ætlanina við kritiskum eygum. Alt sýnist so sjálvsagt, at setur tú spurningar, so virkar tað negativt. Tað vita oddafólkini í Tjóðveldisflokkinum, og tey gera sær dælt av støðuni. Tey, sum ditta sær at hava eina aðra hugsan, eru negativ, undanstøkkingar, samfelagsfíggindar, ganga ørindi fyri fremmanda makt, sum vil føroyingum ilt (Quislingar) o.s.fr.

## Javnaðarflokkurin konstruktivur

Hóast ágangin, og hóast niðurgerðingina, so heldur Javnaðarflokkurin fram at reka ein konstruktivan, frameftir peikandi politikk.

## Sjálvstýrilóg Javnaðarfloksins

Fyri at halda seg til tað, sum flokkurin er mest hartaður fyri av »klóka« taktikkinum hjá oddamonnum Tjóðveldisfloksins, ríkisrættarstøðuna, so hevur eingin annar flokkur so álvarsliga og so grundiga viðgjørt tann spurningin í allari floksskipanini og sent støðu sína út til almenningin. Sjálvstýrilóg Javnaðarfloksins er væl umhugsað og gjøgnumarbeidd og skilagott grundarlag undir nýskapan og øllum framburði, samstundis sum hon gevur komandi ættarliðum fulla heimild og møguleika at virka í ríkinum ella fara úr tí uttan svørðslag, um føroyingar til ta tíð skuldu valt tað.

## Fjølmiðlafólk

halda tit ikki, at nú má spurningurin kunna vendast í dagligu viðgerðini? Man ikki vera upp á tíðina at spyrja serstakliga Tjóðveldisflokkin, men sjálvandi hinar við: Hvat er í Sjálvstýrilóg Javnaðarfloksins, sum tit ikki kunnu taka undir við? Gongur hon í móti fólkaræði, frælsi at ráða sær sjálvum sum tjóð? Tekur hon fíggjarliga grundarlagið undan vælferðarsamfelagnum? o.s.fr.

## Smáligheit (forfængilighed skrivar Jørgen Frants)

Fíggindin er ikki nakar útlendingur. Fíggindin er smáligheitin í okkum føroyingum, sum ístaðin fyri opið og ærliga at tala okkara egnu sak, velja at stara okkum blind í einum máli, sum í veruleikanum átti at verið ein avgreiðslusak.

Leggið til merkis, at meðan »fullveldisfólk« berjast um stakkalastás, skræða gribbarnir solidarisku skipan okkara sundur.

Eg skal koma aftur til tann vælskipaða og konstruktiva andstøðupolitikkin hjá Javnaðarflokkinum í komandi grein. Eg vóni, at tað fer at eydnast aftur at tosa um politikk á fólksligari og solidariskari grund. Vit hava brúk fyri at byggja hetta land og ikki spilla tíðina til at oyðileggja.



VIÐMERKINGAR

# Framtíðarstøða føroyinga!

**Birgir Mohr**
an i



**Vilja hava fullan suverænitet til landið – men lata ognirnar fara?**

Fullveldissamgongan hevur rent seg fasta í sjálvstýrispolitikkinum, og tað var at vænta, tá »hovsa«-loysnirnar hjá landsstýrismanninum í sjálvstýrismálum blivu tann leisturin, sum skuldi bera á mál til sjálvstýri. Fyritreytirnar: sum tað at umsita og gjalda nevnda sjálvstýri, tær blivu elegant umlopnar, sum nakað, ið kundi ornast aftaná, men hesin politikkur er deyðsdømdur, soleiðis ber ikki til.

Vit fingu einki fullveldi, tí vit vilja ikki gjalda prísin fyri fullveldi her og nú, og loysnin var eisini óverdug – karaktersjálvmorð hevur onkur nevnt tiltakið.

Eitt landsstýri, sum í 1998 fór til Danmarkar og kom heim aftur við nógvum peningi umframt hækkaðu og hækkandi blokkstudningi í trý ár fram, mótsigur sær sjálvum, tá tað síðan hevur roynt at billað okkum øðrum inn, at vit ikki nýtast hendan danska pening, og at blokkstuðulin er til fordærv fyri okkum føroyingar? Eingin trýr slíkum leiðarum, sum í stórmálum gera eitt, fyri síðan at mæla til tað mótsatta í sama valskeiði. Slíkt er at undirmeta medvitið hjá borgarunum.

Nei, sjálvstýrispolitikkurin verður best førdur eftir sama hóvliga mynstri, sum vit kenna tað síðan 1948, tó at vit í dag liva í eini aðrari tíð á so mangan máta. Yvirtaka, umsita og gjalda so hvørt inntil vit eru sjálvbjargin.

Alt politiskt arbeiði og vit føroyingar hava nú í trý ár verið í einum fullveldisrúsi, su vit vita ikki ber á mál, óansæð um vit halda fólkaatkvøðu um hetta ella ikki, og eingin fólkaatkvøða kann binda komandi løgting og landsstýri. Fólkaatkvøða um fullveldi er bert ein roynd hjá samgonguni at tvinga andstøðuflokkarnar at føra loysingarpolitikk í framtíðini, men soleiðis ber ikki til at binda demokratiska viljan. Framtíðin ræður sær sjálvum; mandatið hjá verandi samgongu er nú og eitt ár fram. Tá talar fólkið aftur.

Tað ringasta fyri okkum føroyingar er, at øll orkan er farin og fer til hetta evsta valdið = fullveldið, meðan nógv onnur mál verða forsømd og ikki loyst. Dømir eru pensiónsmálið, sum er blivið ein meirskattur ella ein tvungin uppsparing. Ella »Brimla«-málið, sum er við at gerast ein international skomm fyri okkum føroyingar. Men ringast er, at eingin í Tinganesi gevur sær far um, at útlendingar eru við at fara við ognum okkara, og eingin lóg forðar hesum?

Meðan samgongan í Tinganesi gongur í fullveldisrúsi, so seta útlendingar dagskránna í føroyska samfelagnum. Útlendingar yvirtaka avgerðarrættin til, hvar virksemi skal vera, yvirtaka ognarrættin til okkara vinnutól og harvið til okkara náttúruríkidømi. Føroyingar skuldu troyta sama ríkidømi – okkum føroyingum til frama – tað trúðu vit, men git um tað verður so?

Útlendingar hava fingið avgerðarrættin til, hvar oljuvirksemið í Føroyum skal verða – ikki Løgting og Landsstýri okkara? Útlendingar eiga longu stóran part í/av Føroya frægastu skipum? Útlendingar hava roynt og vóru líka við at ogna sær okkara einasta virki til pelagiskan fisk og alifóður? Útlendingar eru við at ogna sær størra partin av alivinnuni? Hetlendingar og íslendingar skulu bjarga okkara fræga og einasta ferðamannafelag eftir sjónum?

Og tá samgongan er liðug og hevur ført sín politikk út í lívið, so eiga útlendingar helst eisini stóran part av Føroya Banka, Atlantsflog, Føroya Fiskavirking, Føroya Fiskasølu, Føroya Tele og kanska enn meira, tí tað er blivið sagt meira enn einaferð, at hesi almennu feløg skulu seljast? Men hvør keypir, útlendingar?

Í fullveldisrúsinum berjast okkara myndugleikar fyri evsta valdi til landið, meðan teir lata útlendingar fara við ognum føroyinga.

Og vit kunnu so av álvara gerast húskallar í egna landi okkara, tí eingin lóg forðar fyri hesum. Men er slíkt í familju við sjálvstýrispolitikk ella nationalan stoltleika? Er tað framtíðarstøða føroyinga?

Hví hava vit gloymt, hvør hevur goldið, tá á stóð? Vóru tað útlendingar? Nei, tað hava vit føroyingar, palleba og marsanna fyrst og fremst, og hvør fíggjaði? Jú, tað bleiv bert ein kreditorur, tá ringast stóð til: danski staturin, sum ikki kravdi hvørki ognarrætt ella avgerðarrætt afturfyri, er tað longu gloymt?

Hvat skulu vit gera í Føroyum, um útlendingar eiga alt, sum fer at kunna geva yvirskot? fiskurin, alingin, oljan, bankavinnan osfr.? Tí tá fer yvirskotið sama veg, til útlandið. Jú, vit kunnu spæla fullveldi, um vit fáa onkran at gjalda undirskotið fyri okkum!

Føroya myndugleikar, farið til verka og syrgið fyri við lóg, eins og tað mátti gerast við »Elektron« á sinni, at ognarrætturin til náttúruríkidømið og føroyska vinnulívið kann verða verandi á føroyskum hondum. Lóggevið ímóti yvirharradømi frá stórspekulantum og útlendskum stórkapitali, sum er við at eta okkum innanífrá við hjálp frá nøkrum heilt fáum her á landi, meðan landsins myndugleikar hyggja at, »sum ryssa yvir deyðum fyli«.

Tað má lóggevast um, og harvið avmarkast, í hvønn mun útlendskur kapitalur skal sleppa at gera íløgur í Føroyum á øllum relevantum økjum.

Og tað er nógv meira ábyrgdarkent at berjast fyri at varðveita landsins ognir, náttúruríkidømi og vinnulív á føroyskum hondum og undir føroyskum avgerðarrætti her og nú, enn at berjast fyri fullveldi her og nú, tí tað seinasta letur seg ikki gera, tí fyritreytirnar eru ikki upp á pláss enn – langt frá.

Sleppið nú tí órealistiska, romantiska tjóðskaparpolitikkinum, sum hevur valdað í Føroyum í skjótt trý ár! Farið heldur og førið realistiskan sjálvstýris- og sjálvbjargnispolitikk.

# Norröna

**Frits Johannesen**



Duga føroyingar einki annað enn at klandrast? Eg meini so við t. d. Brimil, sum nú hevur ligið og snákað sær í Noregi skjótt eina hálva ”øld”, eigur hann einki hjartarúm í okkara medviti? Eftir bakidagar koma snákidagar, verður tikið til. Øll kenna vit søguna um Ólav Halga, hvussu hann var hagreiddur og so tann franska víndunkin, sum varð keyptur til landið uttan fyrilit. Nú hevur verið so mikið av stákan kring hetta vaktarskip, at snákidagarnir skuldu verið av, men svá er ikki. Eg ”moyni” tað.

Tað plagdi at vera hábærsligt at lyfta høvdi høgt og breggja sær eitt sindur. Altíð var tað so, at onkur fekk ilt av hesum. Nú nýggja Norønna er komið upp undir land, er aftur galið. Eg veit ikki hvat tað er, sum ger, at vit ganga í so trongum skóm. Fyri nøkrum árum síðani høvdu vit ein góðan fart til Skotlands við Smirli, men gakk. Sámal Petur í Grund, løgtingsmaður, avhøvdaði sum landsstýrismaður hesa leið, umframt at hann skar ”høvdið” av trimum javnaðarstjórum. Hetta er so smáttskorið at koma framat, og so sveiggja við øksini og kubba á stokkinum bæði so og so. Hesin fartur til Skotlands kundi havt ment seg nógv og verið ein góð leið hjá bæði høgum og lágum at farið eftir í dag.

Nú vísir tað seg, at hetlendingar bjarga Norrønu. Er tað ikki skomm? Landið eigur at seta einar 200 til 300 milliónir í hetta felag (skip), so tað battar. Fullveldið er í eygsjón, tí skulu vit hava ein tignarligan kjøl at sigla á. Lítil dugur verður í okkum, um vit tá fara at sigla landanna millum í tunnuflakum og flita eina skrubbu av Norðhavinum til Skotlands aðru hvørja viku.

Norrøna er ein vegur, ein tunnil og ein jarnbreyt til meginlandið. Ídnaðurin eigur at hava eina góða rás at fara eftir, tá ið hugsað verður um útflutningin. Hetta kann bert gerast við einum dygdargóðum skipi. Minnast skulu vit til, at vit hava langa leið til meginlandi, og hetta kostar okkum dýrt, tí eiga vit hava ein lagaligan fart til ein sámiligan prís til útflutning. Tey, ið vit kappast við, eru á meginlandinum, og hava tey nógv lagaligari kor, tá ið útflutt verður, enn hvat vit hava. Fert tú at ferðast, ja, so eigur hetta eisini vera lagaligt. Í Evropa fara fólk landanna millum sum fon fyri lítið og lætt. Tú kanst fáa eina góða ferð frá Danmark t. d. til París bert fyri 1000 kr. Hetta er sum ein vikuskiftisferð til Suðuroynna.

Álvaratos, Føroyar er ikki øðrvísi enn eitt reiðarí. Landsins myndugleikar (landsstýrið/Løgtingið) eiga at baka soleiðis, at Norrøna verður okkara stoltleiki og veita Smyril Line eina peningaliga hjálp, so tað stendur eftir. Tá ið hetta er gjørt, snáka vit okkum og fara við Norrönu við laksi til París, at ferðast og hyggja eftir heimslist. Hví ikki tað?

# Stutt rættleiðing til Edvard Hermansen

**Jóannes Eidesgaard**



Eg síggi, at Edvard Hermansen í grein við heitinum “Objektivur tíðindaflutningur, ella…?” í endanum sigur, at eg skal hava gjørt mær dælt av støðuni, sum tók seg upp í samband við eitt innslag, sum Útvarpið hevði um formansvalið í Sjálvstýrisflokkinum. Hetta tí, at eg sama kvøld hevði eina viðmerking í Degi og Viku um sama mál.

Lat meg fyrst siga, at tíverri var yvirskriftin til innslagið í Degi og Viku als ikki var í tráð við innihaldið av samrøðuni. Yvirskriftina eigur Svf, meðan eg eigi samrøðuna. Yvirskriftin var, at eg ákærdi Helenu Dam á Neystabø, landsstýrismann fyri embætismisnýtslu. Hetta er púrasta burturvið, tí tað gjørdi eg so avgjørt ikki, tvørturímóti. Viðkomandi journalistur, sum gjørdi samrøðuna, hevur eisini váttað fyri mær, at yvirskriftin, sum Svf hevði gjørt, var heilt villleiðandi.

Eg skal viðganga, at eg var eitt sindur ivasamur, um eg skuldi luttaka ella ei, tí tað var kanska ikki so lætt at halda tunguna mitt í munninum. Men eg kom tó eftir, at tíðindini vóru so mikið skelkandi og “belastandi” fyri okkara politisku skipan, at vit ikki kundu lata tey fara aftur við borðinum. Støðan hevði verið júst tann sama, um tað var onkur annar, sum stóð fyri skotum. Hetta átti ikki at sleppa at hanga í leysum lofti.

So til sjálva samrøðuna. Fyri tað fyrsta legði eg mær eina við at gera eina púra neutrala samrøðu, og fyri tað næsta legði eg mær eina við ikki at ákæra nakran av pørtunum. Samstundis legði eg dent á, at vit sum politikkarar og annars alt Føroya fólk áttu at fáa at vita rætta samanhangin so skjótt sum gjørligt, tí ákærurnar vóru av tí slagnum, sum kann kallast embætismisbrúk. Eg endaði við at siga, at landsstýrismaðurin skjótast gjørligt átti at koma við sínum viðmerkingum eins og løgmaður eisini átti at gera.

Hetta hendi, júst sum tað skuldi.